Skúlin á Argjahamri

Skrivigleði 2017.

Góðu foreldur!

Skúlin á Argjahamri fer at hava eitt skriviátak, sum vit kalla
Skrivigleði 2017
har allir næmingar skúlans fara at skriva frían tekst ein tíma um dagin.

Hetta er í tíðarskeiðnum frá 27. til og við 29.september.

Hvør einstakur næmingur fær eitt serligt skrivihefti frá skúlanum til júst hetta skriviátakið. Og vit øll vóna, at skrivigleði 2017 verður til gleði og gangs fyri børn tykkara.

Kanningar vísa, at tað, ið ein næmingur festir á blað mennir fatanina og harvið lesingina, og at skriving eisini er ein háttur hjá næminginum at ogna sær vitan.

Í hesum átakinum, skal barn tykkara skriva út frá egnum hjarta, egnum høvdi – ella sum ein sigur:” frá livrini”. Barnið fer at fáa ymiskar uppgávur hesar dagar, har møguleiki verður at menna førleikan at skriva frían tekst.

Tann fjalda læran er, at hvør einstakur næmingur skal finna sína skrivigleði fram og fáa kensluna 'at megna' fram. Vónandi eisini hugin at skriva og hugsanina, at tað er ikki so galið ella torført at seta orð á pappír.

Uppgávan hjá foreldrunum er, at barn tykkara hevur góðan blýant við, og at barnið er úthvílt og væl fyri, tá tað kemur í skúla.

Tað verður flokstoymið, ið ger av, hvussu skrivitímin fer fram og nær á degnum tímin er.

Vit øll gleða okkum til skriviátakið Skrivigleði 2017

Vinarliga

Leiðslan, Varðin og Lesivegleiðarin